# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

30. august 2004 fingu Poula Michelsen Kass og Jákup Sverri Fonsdal Kass, Århus, eina dóttir. Hon vigaði 3750 gr og var 53 cm long.

1. september fingu Sunneva Hammer og Kristian H. Stórhamar, Trongisvági, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3880 gr.

2. september fingu Diana og Jann Hansen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

2. september fingu Ásla Djurhuus Johannesen og Sámal Pauli Johannesen, Vági, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4220 gr.

2. sept. fingu Iris Strøm og Magnus Winther, Vági, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3400 gr.

3. september fingu Randi H. Hansen, Saltangará, og Zacharis Thomassen, Sandavági, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4230 gr.

3. september fingu Rannvá av Húsabrúgv og Sámal á Krákusteini, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3750 gr.

4. september fingu Arnleyð og Bergleif Sólsker, Sandi, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3400 gr.

4. september fingu Oluffa og Jonhard Hammer, Norðragøtu, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4600 gr.

4. september fingu Joan Skorheim og Ingi Næss Rasmussen, Kvívík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

5. september fingu Súsanna og Símin Høgnesen, Húsum, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3900 gr.

5. september fingu Guðni og Jørgen Andreasen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

6. september fingu Annika og Hjalti Gleðisheygg, Syðrugøtu, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4625 gr. Drongurin eitur Oddur.

7. september fingu Helena S. Joensen og Eirikur S. Hansen, Nólsoy, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2400 gr.

7. september fingu Maria Skaalum Petersen og Høgni P. Vilhelm, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3350 gr.

9. september fingu Sólvá Káradóttir Eliasen og Klæmint Eliasen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

10. september fingu Málfríð Høj og Jacob Pauli Lamhauge, Strondum, ein son. Hann var 54 cm langurog vigaði 3690 gr.

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

## Hildibjørg Jacobsen 60 ár

Leygardagin komandi fyllir Hildibjørg Jacobsen úr Hvalba, búsitandi í Søborg, 60 ár.

Hildibjørg, sum frá heilt ungum hevur búð í Danmark, hevur trúliga vitjað aftur á nærum hvørjum ári, og nú hon fyllir runt, er tað fyri hana ein sjálvfylgja at halda dagin heima í Krókinum í Hvalba, har hon er fødd og uppvaksin.

Hon er dóttir Paulinu og Hjalgrím Mikkelsen. Foreldrini eru bæði farin, men systkini Elinborg og Mikkjal hava altíð havt og hava enn stórt pláss í hennara verð. Og ikki minni nú nýggju ættar-liðini eru komin til, og familjan sostatt er vaksin munandi.

Hildibjørg er gift Hjørleifi Jacobsen úr Vági. Tey eiga synirnar Kim og Thomas.

Hon er útbúgvin sjúkrahjálpari og hevur arbeitt á røktarheimum inntil í ár. Nú fer hon at taka sær av løttum - sikkurt mest við stokkum í hond.

Hjørleif hevur øll árini arbeitt innan danska postverkið - hann veit nógvar fínar søgur frá teirri tíðini, tá hann luktaði seg fram til føroysku jólapakkarnar.

Hjartaliga tillukku við degnum Hildibjørg, ynskja

**nakrir vinir ið mangan hava sitið væl heima hjá tygon í Søborg.**

## Sverri Jacobsen 60 ár



Fríggjadagin fylti Sverri Jacobsen í Havn 60 ár. Sverri er sonur Margrethu Hvidfeldt. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1967, og fyrsta árið eftir hetta undirvísti hann á Tórshavnar Kommunuskúla. Árið eftir fór hann í starv á venjingarskúlanum, har hann hevur verið síðani.

Tað man tó vera einamest frá ítróttini, at Sverri er landskendur. Bæði sum fótbóltsleikari í HB, og kanska serliga sum hondbóltsleikari í Kyndli taldist hann í drúgt áramál millum bestu leikararnar í landinum. Serliga var tað tekniski førleikin, sum var í hásætinum, og heilt fram til 1987 var hann eisini partur av besta mansliðnum hjá Kyndli.

Sverri er giftur Vemu, f. Jacobsen úr Tórshavn, og saman eiga tey børnini Súna og Eyðgerð.

## Hann er ongantíð arbeiðsleysur



Í dag fyllir ein kendur tvøramaður, Martin Eidesgaard, 85 ár.

Martin Eidesgaard er føddur í Aberdeen, har foreldur hansara hittust, men tá ið hann var eitt ára gamal, fluttu tey heim á Tvøroyri, har hann hevur búleikast síðani.

Ella at siga, at hann hevur búleikast á Tvøroyri er kanska so nógv sagt, tí Martin hevur verið burtur tað mesta av sínum vaksna lívi. Hann hevur siglt bæði við eingilsmonnum, norðmonnum, dønum og íslendingum, umframt at hann hevur verið við føroyskum bátum.

Men mest kendur er hann kortini sum útróðrarmaður í Grønlandi, tí hann róði í fleiri ár út har yviri og hann hevur greitt frá sínum virki í Grønlandi bæði í ùtvarpi, Sjónvarpi og í bókarøðini hjá Jógvani Arge.

Teir løgdu nógv fyri, tá ið teir fóru til Grønlands, tí hann og seks aðrir betaltu 400 krónur í part fyri seksæringin Eirik Reyða, sum teir róðu út við og tað var ikki so lítið í 1939.

Seinni fekk hann sær tó størri útróðrarbátar, eitt skifti hevði hann, sjálvur annar, 15 tonsaran Glæmuna, og seinni hevði hann ein eitt sindur størri út-róðrarbát, sum varð nevndur Torri.

Tey stuttu skifti, hann var á landi, arbeiddi hann hjá eingilsmonnunum undir krígnum, tá ið teir gjørdu støðina á Nakki og í kolinum í Rangabotni.

Mitt í sekstiárunum fór hann á skiparaskúla og tók skiparaprógv og eftir tað førdi hann ymsar bátar. Tey seinastu árini førdi hann sandbát til hann legðist upp, 70 ára gamal.

Hóast Martin nú hevur rokkið kempualdur og væl tað, liggur hann ikki á latu síðuni.

Hann er ongantíð arbeiðsleysur, hann hevur eina trøð og nakrar seyðir so hann bæði hoyggjar og setir epl niður. Hann er eisini í fjørðinum viðhvørt og eftir nátungum o.s.fr., so hann gongur ongan dag fyri onki.

Í dag, føðingardagin, hevur hann opið hús í heiminum á Tvøroyri frá klokkan 10 – 16.

Seinni hava vit samrøðu í Sosialinum við Martin um lív hansara og virki.

### 85 ár

Í dag 11. september verður Martin Eidesgaard, fyrrv. skipari, Tvøroyri 85 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Martin, eru vælkomin inn á gólvið millum kl. 10.00 og 16.00.

### 80 ár

Sunnudagin 12. september verður Esther Hentze, Hvalba, 90 ár. Hon verður burturstødd.

Sunnudagin 12. september verður Dania Dam, Kollafjørður 80 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 17.00.

Mikudagin 15. september verður Jacob Olivar Joensen, bóndi, við Garð, Leirvík, 80 ár.

Dagurin verður hildin hjá Annu og Petur Jákup.

### 65 ár

Svenning av Lofti hátíðarheldur sekstifimm ára dagin við almennari sangløtu og drekkamunni í Ebenezer týskvøldið 14. september, kl. 19.00 stundisliga. Umframt sangkórið og onnur úr Ebenezer, fara Heini Lützen, Magni Christiansen og Frelsunarherurin at syngja. Øll eru vælkomin.

### Brúdleyp

Í dag, leygardagin giftast Tina Kruse, Eiði og Toni Dam, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 9.00 og kl. 11.00 verður brunch á Hotel Føroyum fyri innbodnum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Signhild Thomsen 75 ár



Mánadagin 13. september fyllir Signhild Thomsen, Fuglafjørður, 75 ár.

Signhild er ættað úr Norðragøtu, dóttir Sámal Petur og Jóhannu Malenu Hansen. Tey vóru nýggju systkin, av teimum er Signhild elst. Tey nýggju systkini vóru Signhild, Elinborg, Mildrid, Hanus, Egil, Áslak, Líggjas, Annika og Sverri. Av teimum eru bara fýra eftir á lívi, tey eru Signhild, Hanus, Áslak og Sverri.

Signhild giftist til Fuglafjarðar við John Thomsen. Tey fingu trý børn, Jákup, giftur við Marin og eiga tey 4 børn. Jón, ið er ógiftur og Ninu, ið er gift við Nikláa og eiga tey tríggjar synir. Jákup og Jón búgva báðir í Fuglafirði, meðan Nina er flutt til Saltangará. Afturat hevur hon 7 ommubørn og ein langommu son.

Signhild byrjaði ikki at arbeiða úti fyrrenn hon var um 40 ár. Áðrenn var hon heima og passaði hús og heim, meðan John var til skips.

Vit børnini hava nýtt mangar góðar løtur saman við ommu, og ynskja henni hjartaliga til lukku við føðingardegnum.

Føðingardagurin verður hildin leygardagin, 11. september, hjá dóttrini í Saltangará.

## Kendur hvalbingur 60 ár



Sunnudagin verður kendi hvalbingurin Trygvi Midjord 60 ár. Trygvi er sonur Kristiannu og Jacob Midjord við Neyst í Hvalba, og har kom hann sostatt at slíta sínar barnaskógvar.

Hann er einasti beiggi, men hevur 4 systrar, Paulina, Anna Elisa, Margit og Sólgerð.

Sum ungur royndi Trygvi sjólívið, fiskaði bæði við Ísland og Grønland. Sum flestu hvalbingar var hann eisini í kolinum.

Í 1965 keypti hann sær egnan bil, og fór tá at koyra hýruvogn. Seinni keypti hann sær buss, og fór at koyra privata rutu millum Hvalba og Tvøroyri. Hetta helt kann fram við til 1984, tá ið hann fór at koyra fyri Bygdaleiðir.

Trygvi hevur verið Roynari við stóra R, og hevur hann havt sera nógv at týða fyri felagið. Hevur í mong ár nærum nýtt alla sína frítíð uppá bóltfelagið. Var sum spælari við til at endurstovna fótbóltin í Hvalba í 1968, spældi eftir hetta nógv ár við Royn og hevur eisini roynt seg sum venjari. Venur í dag ungdómsliðini hjá felagnum. Sum tøkk fyri dyggan stuðul í mong Harrans ár og fyri at hava sitið í 20 ár í stjórn felagsins, er Trygvi vorðin heiðurslimur í Royn.

Eisini innan kommunalpolitikk hevur Trygvi drúgvar royndir, og veljarar hava sýnt honum somikið álit, at hann hevur sitið í Hvalbiar bygdaráð síðani 1988.

Í 1973 giftist Trygvi við Rutt Jensen av Tvøroyri, og saman hava tey bygt upp eitt hugnaligt heim, har ein altíð kennir seg vælkomnan. Tey eiga børnini Jákup, Dianu og Kristian og 6 eru abbabørnini.

Tað eru nøkur menniskju, sum duga til alt. Eitt sovorðið menniskja er Trygvi. Hann er sera handaligur, og dugir væl til alt handans verk. Er tí sera góður at heita á, og aldri ber hann seg undan. Nú sólin er komin vestur millum Prest- og Grímsfjall, verður tí við hesum fáu orðum ynskt hjartaliga tillukku við 60 ára degnum og vónandi ført tú ein góðan dag saman við familjuni.

## Sára Mikladal 50 ár



Í morgin, sunnudagin 12. september, verður Sára Mikladal í Klaksvík 50 ár. Ein av synunum fer av landinum í útbúgvingarørindum í morgin, so dagurin verður hildin í dag, tá ið tað frá kl. 12 til kl. 16 verður opið hús í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu.

Sára er klaksvíkingur. Foreldrini eru Jutta og Sigurd Heinesen. Jutta er av Fløttinum. Foreldrini hjá henni vóru Sigga og Sigmund Mikkelsen. Sigurd var ættaður úr Leirvík. Foreldrini hjá honum vóru Sára, sum føðingardagsbarnið eitur eftir, og Jóan Símun Heinesen. Hesin Jóán Símun var 1937–1940 tingmaður fyri Javnaðarflokkin. Hann kom á ting, tá ið Hans Jákup Poulsen á Eiði doyði. Sigurd var lærari og seini varaskúlastjóri í Klaksvík. Hann var 80 ára gamalur, tá hann andaðist í 1995.

Jutta og Sigurd fingu tvær døtur – Sára og Sigrun, sum báðar búgva í Klaksvík. Sára býr saman við manni og børnum í barnaheiminum á Gørðum. Hon er gift við Ísaki Mikladal úr Klaksvík. Tey giftust 12. oktober í 1974. Børnini hjá teimum eru Sigurd Heinesen, sum er føddur 3. februar 1978, (sama føðingardag sum abbin, ið hann er uppkallaður eftir), Meinhard, sum er føddur 12. september í 1983, Jutta, sum er fødd 24. desember í 1985, og Benjamin, sum er føddur 22. juli í 1987.

Sára og næstelsti sonurin hava føðingardag í morgin. Maðurin og pápin er aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, og 12. september er í føroyskum fótbóltshøpi minnisríkur. Í morgin verða tað fjúrtan ár síðani tiltikna sigurin á Eysturríki í Landskrona.

Sára varð í 1982 avlærd sum apoteksassistentur á Tjaldurs apoteki í Havnini. Hon arbeiddi í nógv ár á apotekinum í Klaksvík. Í 1995 fór hon undir at gera til veruleika barnadreymin um at fylgja í faðirsins fótasporum í lærarayrkinum. Sára leyk læraraprógv á læraraskúlanum í Havnini í 1999. Síðani hevur hon verið lærari á Syðradali og Húsum. Síðsta skúlaár hevði hon farloyvi, men í august mánað í ár herjaði hon á aftur.

## Bergfríð Klakstein 50 ár



Bergfríð Klakstein fylti týsdagin 7. septembur 50 ár. Bergfríð er gift

Súlberg Klakstein og eiga tey fimm børn, Jóhan (27), Beinta (25), Zakaris (21), Bjørg (13) og Jákup Bernhard (10). Eisini er fyrsti ommubarnid komið.

Bergfríð er dóttir Zakareu og Jákup Bernhard Petersen, sálu, vanliga nevnd Dea og Bernhard í Brekkuni.

Úti í Brekkuni vaks hon upp saman við tveimum beiggjum og trimum systrum.

Hon gekk øll síni skúlaár á Ziskartrøð og 17 ára gomul byrjaði hon at arbeiða á Toll og Skatt, har hon hevur verið síðani.

Bergfríð hevur í mong ár verið limur í Javna, og harafturat er tað ymiskt hondarbeiði ið hevur hennara áhuga.

Tillukku við tí stóra degnum og alt gott framyvir!

## Dagurin

**11. september. Hildibjartur**. Føroyskt navn fyri Hillebert, sum var biskupur í Tours í Fraklandi og doyði í 1134.

Upprunaliga týskt navn, ið merkir *stríð* og *bjartur*.

**12. september. Guido,** deyður í 1012. Guðrøkin ungur maður, sum gjørdi fleiri pílagrímsferðir. Heimafturkomin doyði hann í Anderlecht í Hálandi av stravnu ferðum sínum. Fleiri undurverk hendu við grøv hansara, og tí varð hann lýstur halgimenni

**13. september. Cyprianus**, deyður í 258. Hann var sakførari og lærari í Kartago, men 45 ára gamal gjørdist hann kristin og varð tvey ár sinni valdur til biskup. Hann skrivaði nógvar lærubøkur og søgubøkur, og handrit hansara eru týdningarmiklar keldur til søguna hjá fornkirkjuni. Hann var tikin av døgum undir Valerianus keisara.

## Andlát

2. september
Leo Simonsen, vanliga nevdur Leo í Toft, Klaksvík, 81 ár.

3. september
Mathilda Lamhauge, Runavík, 82 ár.

5. september
Ragnar Thomasen, úr Sørvági, sonur Jafet og Bjørg, 22 ár.

6. september
Thomas Arge, Tórshavn, 66 ár.

7. september
Sigfred Hansen í Sørvági, 78 ár.
Nicolina Hansen, Kollafjørður, 84 ár.

8. september
Jacob Jacobsen í Vági, nevndur Jacob hjá Dallanum, 76 ár.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Anna Elisabeth Thomsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Lágargarð, og tøkk til tykkum sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Eisini takka vit tykkum á Lágargarði, sum vóru um hana tey seinastu árini, og tykkum, sum vitjaðu hana har. Heimahjálpir og onnur, sum vóru um hana, innan hon fór á Lágargarð, fáa eisini eina hjartaliga tøkk.

*Familjunnar vegna*

**Jákup, Tummas Pauli, Margreta og Matilda**